**Hanna D. Andreassen**

**Fra:** Símun Poulsen <simun@vh.fo>
**Sendt:** Thursday, February 1, 2024 11:56
**Til:** Barna- og Útbúgvingar Málaráðið
**Emne:** SV: Hoyringarskriv – Uppskot um løgtingslóg um føroyskan førleikakarm

Til rætta viðkomandi

Vinnuháskúlin tekur undir við hesum lógaruppskoti og fegnast um tilgongdina við at skapa betri grundarlag fyri samanberingum av útbúgvingum.

Í hesum sambandi, hava vit tó eina viðmerking til § 4 um sjálvan førleikastigan.
Uppskotið hevur 7 førleikastig – men vit vilja staðiliga mæla til at brúka ein og saman stiga sum Europa, soleiðis at føroyski stigin eisini hevur 8 stig.

Hetta vil lata upp fyri greiðari og einfaldari samanlíkning. Ein føroysk Ph.D. er stig 8 – eins og ein donsk ella europeisk Ph.D. er á stig 8.
Her verður ikki neyðugt at forklára ella skjalprógva, hví ein føroysk Ph.D.“bert” hevur stig 7 (soleiðis sum verandi uppskot er orðað).

Okkara tilmæli, um at brúka 8 stig og at gera hetta frá byrjan av er fyri at tryggja, at man kemur rætt og skynsamt í gongd við at samanbera føroysku útbúgvingarnar við onnur europeisk lond.

Um man metir, at fólkskúlin skal vera stig 2, so ber til at skriva 7. Flokk á stig 1.

Fyri Vinnuháskúlan hevur hetta týdning, tí flestu av okkara lesandi fara í altjóða vinnu. Eisini síggja vit fleiri, sum lesa víðari uttanlands. Føroysku maritimu útbúgvingarnar, ávikavist maskinmeistari og skipsførari, eru javnsettar við danskar útbúgvingar – og hesar eru á stig 6.

Líkastillingsavtala er gjørd millum Føroya Landstýri og danska Sjóvinnustýrið um líkastilling av føroyskum og tilsvarandi donskum útbúgvingum og sjóvinnubrøvum.

Vinarliga heilsan

VINNUHÁSKÚLIN

**Símun Poulsen**
**Stjóri**
Nóatún 2, Postbox 104
FO-110 Tórshavn
Fartelefon +298 517 220
www.vh.fo – simun@vh.fo

**Fra:** Terji Beder <TerjiB@bumr.fo>
**Sendt:** týsdagur, 16. januar 2024 15:06
**Til:** Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; Almanna- og mentamálaráðið <ammr@ammr.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Umhvørvismálaráðið <umhvorvi@umhvorvi.fo>; Løgmálaráðið <lmr@lmr.fo>; Johanna Heinesen <uvs@uvs.fo>; Vegleiðingarstovan <vegleiding@uvs.fo>; Studni <studni@studni.fo>; Prógvstovan <provstovan@provstovan.fo>; Yrkisdepilin <yrkisdepilin@yrkisdepilin.fo>; Nám <nam@nam.fo>; setur@setur.fo; VH-Info <info@vh.fo>; sjonam@sjonam.fo; Heilsuskúli Føroya <heilsuskulin@skulin.fo>; tsk@tsk.fo; post@glasir.fo; Miðnámsskúlin í Suðuroy <mis@skulin.fo>; Miðnámsskúlin á Kambsdali <kambsdalur@kambsdalur.fo>; miv@miv.fo; rtl@student.setur.fo; mfs@mfs.fo; Granskingarráðið <Gransking@gransking.fo>; industry@industry.fo; kf@kf.fo
**Cc:** Barna- og Útbúgvingar Málaráðið <bumr@bumr.fo>; hanna <hanna@bumr.fo>; Elsa Østergaard <elsao@bumr.fo>
**Emne:** Hoyringarskriv – Uppskot um løgtingslóg um føroyskan førleikakarm

Góðan dagin,
Í sambandi við at ein førleikakarmur verður lýstur fyri tað føroyska útbúgvingarverkið, verður hjálagda lógaruppskot sent øllum viðkomandi pørtum til hoyringar.

**Frágreiðing**
Endamálið við lógaruppskotinum er at geva heimild til at kunna skipa ein føroyskan førleikakarm, sum skal fevna um allar prógvskyldugar og førleikagevandi útbúgvingar í Føroyum.
Ætlanin um at seta í gildi ein tílíkan førleikakarm kemst av ynskinum um, at Føroyar gerast fevnd av Bolognaavtaluni, og at tær føroysku útbúgvingarnar annars betri skulu kunna samanberast við aðrar útbúgvingar uttanlands.

Endamálið við førleikakarminum er at skapa samanhang millum føroyskar útbúgvingar og útbúgvingar í Evropa, soleiðis at hesar betri kunnu samanberast, umframt at skapa ein betri samanhang millum tær útbúgvingar, sum vit hava í Føroyum.
Endamálið er eisini at tryggja, at næmingar á einari givnari útbúgving ikki skulu taka fak, sum teir longu hava fullført á einum øðrum stigi í útbúgvingarskipanini, og at skapa betri møguleikar fyri lívlangari læru.

Við innførslu av einum førleikakarmi, skulu allar prógvskyldugar og førleikagevandi útbúgvingar í Føroyum vísa til tann føroyska førleikakarmin í námsskipanum, námsætlanum og prógvum.
Prógvini skulu eisini vísa til tann evropeiska førleikakarmin fyri lívlanga læru (European Qualifications Framework for Lifelong Learning), og tá tað kemur til hægri útbúgvingar, skal eisini vísast til tann evropeiska førleikakarmin fyri hægri útbúgvingar (Framework of Qualifications for the European Higher Education Area).

Við uppskotinum fær landsstýrismaðurin heimild at góðkenna ein førleikakarm, umframt at flokka tær føroysku útbúgvingarnar eftir førleikakarminum.

Landsstýrismaðurin fær eisini heimild at gera nærri reglur um flokking av útbúgvingum, um førleikakarmin, harundir um námsskipan og námsætlan, prógv, heitir og Diploma Supplement.

Lógaruppskotið verður rættlisið eftir at hoyringarfreistin er farin.

Møguligar viðmerkingar vera sendar til bumr@bumr.fo í seinasta lagi **hósdagin 1. februar 2024 kl. 12.00.**

Vinarliga / Kind regards

**Terji Beder**
Fulltrúi / Advisor

Office: +298 306500
Mobile: +298 555018
Mail: terjib@bumr.fo

**BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ**
Ministry of Children and Education

J. H. Schrøtersgøta 7
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

www.bumr.fo